Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í vinnumálum

Evni: Vegasambandið um Haraldssund

Spurningar:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, um nøkur verkætlan um vegasambandið um Haraldssund fyriliggur hjá Landsverki, og hvat ein slík verkætlan er mett at kosta í dag?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at fremja eina slíka ætlan ella eina aðra møguliga betri ætlan?
3. Um ja, hvør er tíðarætlanin hjá landsstýrinum um at fremja hesa ætlanina?

Viðmerkingar:
Síðan 1986 hevur samlaða politiska skipanin ikki raðfest vegasambandið um Haraldssund so mikið nógv, at verkætlanin nakrantíð er gjørd liðug.

Tað hava onkrar ætlanir verið um at gera byrgingina lidna, men tað er ongantíð komið á mál.

Tíðliga í vár varð upplýst, at ein verkætlan er gjørd hjá Landsverki, og at tað kostar 45 milliónir krónur at gera hetta arbeiðið, sum ætlanin var at fáa við í løguætlanina fyri komandi árini.

Tað má metast vera sera óheppið, at verkætlanin ongantíð er gjørd liðug, og at mann nú kann hava eitt 40 ára hald fyri, at hetta ikki er gjørt.

Tí hesir spurningar til landsstýrismannin.

Á Løgtingi, 19. mai 2026,

Eirikur í Jákupsstovu